tíðindablaðið sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Høgni Mohr
Yngd: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Demokrati og semjur — breiðar og smalar

Oddagrein

DEMOKRATI er gamalt hugtak og umseta vit tað vanliga við fólkaræði. Hvussu demokrati best verður útint hevur verið tjakast um í øldir. Platon og Aristoteles hugleiddu um bestu demokratisku skipanina, ið útintu fólkaræði best. Endaligar niðurstøður fingust ikki. Tí verður demokratiska processin altíð »tann best møguliga« og ongantíð »tann besta«. Týskarin Robert Michels, ið livdi tvørtur um fyrra aldarskifti, kom til ta niðurstøðu, at í veruleikanum er tað ein lítil minniluti, ið stýrir einum stórum líkasælum meiriluta.

DEMOKRATIIÐ hjá okkum er eitt sokallað umboðsdemokrati, har vald umboð taka støðu fólksins vegna. Ein av veikleikunum við hesi skipan er, at fleiri ár eru ímillum, at hesi umboð blíva vald. Umboðini - politikararnir koma í hesum tíðarskeiði longur og longur burtur frá tí veruliga lívinum. »Ostaklokkuumhvørvið« í parlamentunum syrgja partvíst fyri hesum og fyri teir politikarar, ið hava makt, hendir so tað, at teir verða umgyrdir av »ryggklapparum« og »ja sigarum« so enn truplari verður hjá hesum at merkja, hvat veruliga rørist í samfelagnum. Úrslitið verður so, at tað, sum skuldi verða fólkaræði og politikkur, blívir til matematikk. Tað altavgerðandi verður nú í »ostaklokkuverðini« meirlutar, breiðir og smalir, minnilutar smáir og stórir - snøgt sagt tal av tingmonnum. Hettar er so tann skipanin.

SKIPANIN við frælsum fjølmiðlum er ein annar partur av okkara fólkaræði. Teir skulu fylgja við, um fólkaræðið veruliga virkar. Fjølmiðlarnir grunda sítt virksemi og sínar niðurstøður á alt tað, sum rørist og fer fram í samfelagnum, hvønn dag og hvørja løtu. Politiskar niðurstøður í fjølmiðlunum kunnu ikki bert gerast út frá matematiskum útrokningum í tinginum - tá svíkja teir sína uppgávu í fólkaræðisligu skipanini.

Í løtuni er størsta politiska málið okkara samstarvsviðurskifti við Danmark. Eingin kann vera í iva um, at best var, um vit her heima kundu samst um eina skipan, sum øll kundu tikið undir við og liva undir. Okkara samráðingarleiðari til komandi samráðingar hevur leingi eftirlýst eina breiða semju í hesum spurningi. Semjan hann eftirlýsti er ímillum flokkar og tingfólk. Hann hevur longu eina semju sum er niðurfeld í samgonguskjalinum. Helst man hann meta, at hendan semjan er ov smøl at fara av landinum við.

TAÐ sær út til at samguplattformurin í ríkisrættarliga spurninginum ikki kann breiðkast í tinginum og enn og minni út ímillum fólkið. Í tí sambandi hevur verið víst á, at tað er grundarlag fyri einari breiðari semju á øðrum plattformi enn tann, ið løgmaður longu hevur. Henda niðurstøðan er gjørd út frá tí, ið politikarar formliga og óformliga føra fram og ikki minst tí, sum rørir seg út ímillum fólkið í hesum landi. Henda niðurstøðu tykist at vera fallið onkrum fyri brósti, tí hettar ikki passar inn í kunngjørdu matematikkina í tinginum.

HER skal tí bert verða viðmerkt, at tann »líkasæli meirlutin«, sum Robert Michels tosar um, kanska ikki er so líkasælur, tá ið til stykkis kemur. Og tað er m.a. út frá hesum, at niðurstøður eru gjørdar í viðmerkingum í fjølmiðlunum.

Sosialurin

Viðmerking:

Skattalætti sjómanna er eitt endurgjald

Tað ber ikki til at lata alt fara aftur við borðinum. Tá ið viðurskifti hjá fleiri hundrað monnum áhaldandi verða drigin fram í fjølmiðlum, ið nýta ymiskar stjórar og frøðingar sum keldu, er tíð at tala at.

Ivasamar patentloysnir

Skattalættin hjá sjómonnum tykist vera ein tornur í eygunum á mongum manni, ið illa nokk hevur latið sítt vatn í saltan sjógv. Longsti túrur teirra er kanska av Kongabrúnni og eystur ímóti Borðuni, men kortini hava teir patentloysnina til fiskimenn og fiskivinnu. Ikki tað at siga, enn er landið frítt, so ein og hvør kann siga sína hugsan.

Munur er á

Í mínum hugaheimi er skattalættin til sjómannin ein endurrindan, sum er vanlig í øðrum londum. Menn eru burturi frá heimum og familjum sínum í mánaðir. Tuskast á sjónum fjart frá øllum familjulívi. Sambandið við konur og børn er gjøgnum telefonina. Sjómaðurin hevur ikki arbeiðstíð frá níggju til fýra. Hann er bundin at sínum arbeiðsplássi 24 tímar um samdøgrið. Hansara arbeiðsbúni er ikki slips og svartaskógvar, og hann hevur onga fjálga skrivstovu at sita og brúka seg í um góðu skattasømdir sjómanna.

Eru arbeiðsumstøður teirra á sjónum so góðar, so er bara at liggja framvið og søkja sær kjans!

Rós og rís

Fört verður eisini fram, at sjómenn ið eru farnir av landinum, ikki koma aftur í nóg stórum tali. Eg spyrji, hvussu nógvir høvdu verið rýmdir, um skattalættin ikki varð settur í gildi.

Rós og rís í somu nøgdum; Óli Jacobsen, Anfinn Kallsberg og onnur hava tøkk uppborna fyri at fáa skipanina í lag.

Hvaðani koma krónurnar?

Stóri trupulleikin hjá stjórum og frøðingum tykist vera, at ov lítið lønsemi skal vera í vinnuni. Gamaní, tilfeingið er ogn alra føroyinga, men eg má spyrja, hvaðani peningastovnar, landskassin, smiðjur, skipasmiðjur og mong onnur fáa peningin peningin at arbeiða við. Ein milliard kemur frá dønum; annars livir og andar alt her á landi enn av fiski og bert fiski.

Fiskivinnan er grundarlagið

Ongantíð hava so fá dragsað so nógv upp á land til frama fyri so mong. Tað mátti verið ein sonn avbjóðing fyri

frøðingar og búskaparráð at fingið teir almennu stovnarnar at virka og javnviga fíggjarliga. Har liggur nógv á láni, og tað hevði kraft sínar menn, ið hava skil á fíggjarstýring.

Fari at enda at staðfesta, at gongst tað sjómonnunum og fiskivinnu væl, gongst okkum øllum væl.

Vinarliga
Martin J. Strøm

Vest Pack altjóða góðkenning

Plkastvirkið Vest Pack í Vestmanna bjóða í dag almenninginum at síggja framleiðsluna á virkinum, sum annars bert fer fram handan læstar dyr. Virkið hevur nú fingið ISO 9002 góðkenning til bæði sølu og framleiðslu av pakkitilfari

Eftir at hava arbeitt í drúgva tíð, er nú komið á mál við at góðskutryggja vørurnar, ið framleiddar verða á P/F Vest Pack. Felagið hevur fingið ISO 9002 góðkenning til bæði framleiðslu og sølu av pakkitilfari.

P/F Vest Pack varð stovnað í 1994 og tók yvir virksemið hjá P/F Tór Plast, sum byrjaði plastframleiðslu í 1977.

Árliga framleiðsluorkan á virkinum er 2000 tons, og við nógvum fjølbroyttum maskinum kunnu fleiri ymiskar vørur framleiðast samstundis. Nevnast kann m.a. extrudering og sveising av plastfoliu, umframt prenting av posum og pakningi eftir ynskjum viðskiftafólkana.

Virksemið fevnir stórt sæð um framleiðslu av plastpakningi og merkiseðlum til fíðnað, handil og privata nýtslu. Meginreglan hjá P/F Vest Pack er at nøkta einhvønn tørv innan pakkitilfar, og í hesum sambandi kann virkið serframleiða pakkitilfar, umframt at felagið veitir annað pakkitilfar, ið verður framleitt aðrastaðni.

P/F Vest Pack hevur seinastu tíðina víðkað um virksemi sítt til eisini at fevna um heildarloysnir innan pakkilinjur. T.v.s. at felagið, umframt at veita pakkitilfar, eisini veitir ráðgevan, sum byggir á áralangar royndir og endaliga eisini bjóðar seg fram at veita maskinur o. a., ið skal nýtast til pakkilinjuna.

Ein stórur partur av pakninginum, ið verður framleiddur á P/F Vest Pack, verður nýttur í samband við matvørur. Krøvini til tílíkan pakkning eru sera stór, og verða bert rávørur, ið eru góðkendar til pakking av matvørum, nýttar til hendan partin av framleiðsluni.

At felagið nú er ISO 9002 góðkent merkir, at vit í nógv størri mun kunnu fylgja framleiðsluni og tryggja, at mannagongdirnar verða fylgdar. Endamálið er at náa best hugsandi úrslitinum, bæði fíggjarliga, innan góðsku og viðskiftanøgdsemi.

Á P/F Vest Pack eru 17 starvsfólk, har flestu av teimum hava drúgvar royndir innan økið. Í samband við ISO 9002 góðkenningina hava øll teirra fingið ta útbúgving, ið skal tryggja, at góðskustýringsskipanin kann verða á tí støði, vit hava sett okkum fyri.

Av trygdar- og kappingarávum fer framleiðslan á virkinum vanliga fram handan afturalatnar dyr, men í dag frá kl. 15.00 til 18.00 verður almenn móttøka í P/F Vest Pack, har høvi verður hjá teimum vitjandi at síggja einasta framleiðsluvirkið í Føroyum av slíkum slag.

Starvsfólk fer at greiða frá um framleiðsluna og um ISO 9002 góðkenningina.

Enn ein eykasýning

Ein eykasýning afturat av Móðir Sjeystjørnu - ein tónleikamynd, verður í leikhúsinum hjá Grímu á Gamla Meiarínum í Tórsgøtu sunnudagin tann 20. februar 2000 kl. 16.00.

Leikurin, ið byggir á skaldsøguna hjá William Heinesen við sama navni, hevur verið sera væl umtóktur og hevur fingið sera góð ummæli. Áhugin at síggja leikin hevur verið sera stórur. Eykasýningar hava verið, bæði fyri skúlum og almennar.

Við tað, at spælt verður sunnudagin kl. 16, er sostatt enn møguleiki hjá avbygdafólki at síggja leikin og sleppa til hús eftir sýningina. Tað verður iki farið á bygd við leikinum Móðir Sjeystjørna, men onkrir fyrispurningar eru um at fáa leikin til útlandið.

Atgongumerki konstar kr. 100,-.

Leikurin viðgerð tey afturvendnadi menniskjansligu fyribrigdini, bardagan millum lív og deyða, tað tímiliga og tað æviga, dreym og veruleika, kærleika og vón og mangt, mangt annað.

Sýningin sunnudagin verður avgjørt seinasta eykasýningin á hesum sinni, tí aðrar uppgávur bíða.

Virksemi á Grímu er stórt, og veksur alsamt. M.a. skulu sýningarnar av barnaleikinum »Eitt ross og annað« halda fram, bæði í Havn og á bygd. Eisini skulu sýningarnar við einmansleikinum »Óndskapurin« halda fram á bygd. Seinast í hesum mánaðinum verður eisini framhald av skeiði í leikritaskriving við Eyðun Johannessen og Jørgen Ljungdal, dramatikara.

Vágbingar bróta upp úr nýggjum:

Veiða vetrarnáta við Mai

Um nakrar dagar fer Mai at royna eftir vetrarnáta við Føroyar. Fimm vágbingar hava keypt skipið og búgvið tað til nátaveiðu og Mai verður fyrsta skipið, sum fer undir skipaða veiðu eftir vetrarnáta. Alt skal tilgeras umborð og øll loyvir eru fingin til vegað - bæði veiðuloyvir og hagreiðingarloyvi

Mai við bryggju í Gøtu, men um fáar dagar fer hon avstað at royna eftir vetrarnáta. Fimm vágbingar hava keypt Mai frá miðvingum og gjørt hana út til at royna eftir vetrarnáta kring Føroyar. Hetta er ikki roynt á henda hátt áður í Føroyum

Mynd: Jens Kristian Vang

SVEINUR TRÓNDARSON

Um nakrar fáar dagar fer gamli línubáturin Mai undir heilt nýggjan tátt. Hann fer at royna eftir vetrarnáta við Føroyar og tað eru fimm vágbingar, sum standa aftanfyri hetta slóðbrótandi tiltak.

Vágbingarnir keyptu Mai, við ongum fiskiloyvi, og tí skuldi finnast upp á okkurt annað. Hugskotið við vetrarnátanum kom á borðið, og síðani hevur verið arbeitt víðari við tí.

Nátin skal virkast umborð og øll loyvini eru komin til høldar, sigur ein av stigtakarunum, sum vil vera ónevndur.

Hvussu prísur og nøgd fara at laga seg torir hann kortini ikki at meta um, tí enn er vitanin um tað ov lítil, men tað plagar at vera nóg mikið til av náta, so tað verður neyvan trupulleikin., sigur hann

Sjáldsamt inntøkugrundarlag

Hóast tað er nógvur vetrarnáti til kring Føroyar, so ætla eigararnir av Mai ikki, bara at leggja seg eftir nátanum. Tí ætla teir sær eisini at royna eftir øðrum forkunnugum, sum kann geva teimum inntøkur.

Nógv er til at brugdu kring oyggjarnar og tí hava teir søkt - og fingið - loyvið at skjóta brugdu.

– Seinast eg visti var góður prísur fyri brugdufinnurnar einar 220 krónur fyri kilo, so tað ætla vit skal vera eitt íkast til raksturin, sigur eini av stigtakarunum.

Annars er ætlanin at keypa lomviga úr Íslandi, tá hetta høvið býðst. Við hvørt fáa íslendskir fiskimenn nógvan lomviga í gørnunum og hann verður seldur á uppboði. Har ætla vit at liggja framvið eisini, sigur vágbingurin.

Framleiða til heimamarknaðin

Sum nevnt er ætlanin, at øll veiðan, skal hagreiðast umborð. Fýra roytingarmaskinur eru settar upp, og øll loyvir fíra heilsumyndugleikum eru fingin til vegað soleiðis, at veiðan kann hagreiðast umborð.

– Heilsufrøðiliga Starvsstovan setur harðar treytir fyri slíkum, men vit hava arbeitt væl saman við teimum og nú er klárt at fara avstað.

Vetrarnáti hevur verið forkunnugur matur á føroyska borðiskinum, men tað ætla vágbingarnir skal verða øðrvísi í framtíðini. Teir ætla - og væntа - nevniliga serliga at framleiða til heimamarknaðin.

– Vit hugsa ikki um útflutning, men roknað við at kunna selja meginpartin her heima. Tó so, okkurt føroyingafelag uttanlands hava víst tiltakinum stóran áhuga, og okkurt teirra hevur longu bílagt vetrarnáta.

Sum skilst vænta fyrireikararnir ikki, at tað fer at vera trupult at sleppa av við vetrarnátan, sum er til í ríkiligt mát kring Føroyar.

– Vit ætla við tíðini, at framleiðslan skal koma upp á eini 500 nátar um dagin, men tað verður neyvan so í byrjanini, sigur vágbingurin.

Ferðastjórin innstillast í næstu viku

Stýrið fyri Ferðaráðið er farið at viðgera tær fjúrtan umsóknirnar

SVEINUR TRÓNDARSON

Í síðstu viku var freistin úti at søkja stjórastarvið á Ferðaráð Føroya og longu nú er stýrið væl á veg, at viðgera tær umsóknirnar hon hevur valt at arbeiða víðari við.

Formaðurin í stýrinum fyri Ferðaráð Føroya, Petur Ólivar í Hoyvík, sigur við Sosialin, at hann væntar at stýrið verður liðugt við viðgerðina fyrst í næstu viku og at innstillingin frá stýrinum fer at vera greið tá.

Fjúrtan umsóknir komu til stjórastarvið, og tað er stýrisformaðurin væl nøgdur við.

– Tað vísir at tað er stórur áhugi at gerast stjóri í føroysku ferðavinnuni, sigur hann.

Trettan umsóknir vóru frá føroyingum, meðan ein var frá útlendingi.